# EINGIN TOSKUR Á FLEMISH CAP

síða 3

tíðindablaðið sosialurin

7,–

Nr. 170 ★ hósdagur 9. september1993

# ENDAVENDA BANKUNUM Í RÆTTINUM

Tíðindablaðið Sosialinunn fylgir við Heygadrangs málinum. Lesið á síðu 6 og 7

# ÍSLENDINGAR Í ØÐINI INN Á FØROYINGAR

**Edvard T. Jónsson**
**úr Reykjavík**

Stríð er við at taka seg upp millum Føroyar og Ísland. Í gjár bað íslendska sjóverjan tveir føroyskar trolarar um at fara út um íslendskt mark, nær miðlinjuna millum londini.

Íslendska sjóverjan sigur, at føroyingar altíð hava aktað hesi boð, men hesaferð vilja skipini hvørki svara ella flyta seg úr økinum, talan er um. Íslendska stjórnin hevur kært til danska uttanríkismálaráðið.

Tað er greitt, at íslendingar meta málið sum sera álvarsligt. Talan er um eina sokallað »gráa leið« millum londini.

## *Heimsins størsta seismikkfyritøka vitjar í Føroyum:*

# – Vit kunnu byrja í apríl



*Ein søguligur dagur á tingi, tá uppskot um oljukanningar var fyri. Stjórin í heimsins størstu seismikkfyritøku Peter Philips var millum lurtararnar, tá tingið fór undir viðgerðina. Her heilsar hann uppá sambandstingmannin Finnboga Arge. Við lið hansara Johan Mortensen, bretskur konsul og limur í felagnum Føroya Oljuídnaður. Mynd kalmar*

## NÝGGJA KAPPINGIN »15 SPURNINGAR UM SKOTLAND«

byrjar í blaðnum leygardagin 11. sept. **FRÁLÍKIR VINNINGAR** Síða 16 & 17

*Stjórin í heimsins størstu seismikkfyritøkur vitjar:*

# Vit kunnu byrja í apríl næsta ár



*Peter Philips, stjóri í heimsins størsta seismikkfelag vitjar í Føroyum. mynd kalmar*

*-Eg verði ikki kløkkur finna tit olju í føroysku undirgrundini sigur Peter Philips, júst útafturkomin úr tingsalinum, har tingmenn í gjár fóru undir at umrøða alt oljumálið. Hann er stjóri í heimsins størstu seismikkfyritøku og býðir sær nú ókeypis at gera seismiskar kanningar við Føroyar. Tær koma at kosta fyritøkuni einar 30 mill. kr.*

Í gjár fór tingið undir at viðgera spurningin um kanningar í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu í Føroyum.

Millum áhoyrarnar á tingi var eisini stjórin í heimsins størstu seismikk fyritøku. Hann er breti og eitur Peter Philip. Fyritøka hansara Geco arbeiðir kring allan heim og er nú eisini hugað at fara undir seismiskar kanningar í Føroyum. Teir gera kanningar bæði á landi og í sjónum. Peter Philip sigur, at tað verður ikki aktuelt at gera kanningar á landi í Føroyum, tí fjøllini eru høg og basaltløgini harefur. Tað verður betri at arbeiða á sjónum, tí harvið verða basaltløgini tynri.

Peter Philip sigur, at Geco vanliga arbeiðir fyri oljufyritøkur, sum ynskja seismisk kanningarúrslit. Men teir gera so eisini sjálvbodnir kanningar fyri egna rokning. Teir arbeiða fyri øll tey størstu oljufeløgini í heiminum, BP, Statoil, Mærsk osfr.

Geco arbeiðir í dag í Norðsjónum, í vestur afrika og við Falklandsoyggjarnar. Peter Philips sigur, at teir møguliga kunnu brúka royndir frá Falklandsoyggjunum í sínum kanningum við Føroyar, tí hesi bæði økini í fleiri førum eru rættiliga samlík.

Úrslitið av kanningunum har eru sera áhugaverd og eru teir í ferð við at viðgera tey. Forvitnisligt er eisini at nevna, at verður farið í gongd at gera seismiskar kanningar í Føroyum næsta ár, so liggja Føroyar bert eitt ár aftanafyri Falklandsoyggjarnar, tá talan er um at leita eftir olju og gassi.

Peter Philips sigur, at felag hansara er hugað at fara undir kanningar í Føroyum og hevur landsstýrið fingið hetta at vita. Teir hava longu havt samband við fleiri stór oljufeløg, sum eru sinnað at keypa upplýsingar um føroysku undirgrundina.

Peter Philips vísir annars á, at fáa teir loyvi til at gera kanningar, so kunnu tær byrjar í apríl næsta ár. Tá mugu teir so hava fingið boð um hetta í seinasta lagi tíðliga næsta ár.

Fáa teir t.d. loyvi til at kanna eitt øki upp á einar 5000 ferkilometrar fer tað at kosta teimum einar 35 mill. kr. Hesa útreiðslur taka teir sjálvir á seg, tó so at teir royna at fáa oljufeløgini, sum eru sinnað at keypa upplýsingarnar at fíggja kanska eini 50%, soleiðis at tey tá eisini eru við at taka tjansin, nú eingin veit, um olja er í undirgrundini.

Spurdur um hann heldur olja finst í undirgrundini sigur Peter Philips, at hetta kunnu bert kanningar siga nakað um. Men eg verið ikki kløkkur, um tit finna olju í føroysku undirgrundini. Hann vísir við hesum til jarðfrøðina í økinum og tey seinastu fundini vestan fyri Hetland.

Lesið samrøðu við Peter Philips í næsta blað.

jan



*Atli Dam, framsøgumaður javnaðarfloksins í olju- og undirgrundarmálinum á tingi í gjár. Mynd kalmar*

ORIGO MAC 99
– Svenskt & gott –

Nu kanst tu eisini taka Pal, DM MAC, D2-MAC og Euro-Crypt M&S kodaðar sendingar

Við eykautgerðini PSU 100 streymveitingini, kanst tu harumframt hava motorstýrdan parabol

Lætt og skilagott í brúki – eingir knøttar á móttakara – alt er á fjarstýringini



Nakrir av hentleikunum...

- 199 kanalir at programmera eftir vild
- 2 kortlesarar
- Frekvensur 10 850 GHz – 12 900 GHz
- Kann setast til 2 parabolar (2 LNB inntøk)
- 32 ljóðstillingar (Stereo & Mono)
- Danskir undirtekstir á D2-MAC kanalum
- Klárgjørdur til videocrypt
- & m a

Kann latast við 90,100 ella 120 cm paraboli

Prísir frá bert 4.895,-

SatrOnic
Box 49 · 600 Saltangara · Tlf 48940 · Fax 48947